## Nýggjan sparikassa fyri 60 milliónir

Norðlýsið skrivar, at Norðoya Sparikassi í Klaksvík hevur keypt økið framvið Ósánna, úr Biskupsstøðgøtu og suður móti Ósáskúlanum. Ætlanin er at byggja nýggjan bygning fyri 60 milliónir á økinum. Eyðfinn Reyðberg sigur, at tørvurin á plássi er akuttur á deildini, og at ætlanir um útbygging hava verið ávegis í nøkur ár. Seinasta útbygging var í 1970 árunum, tá 10 fólk starvaðust á deildini. Í dag eru 40 fólk til arbeiðis í í somu hølum. Sparikassastjórin vónar, at arbeiðið verður liðugt í 2012.



## Kina ger stóra íløgu

Kinesarar eru til reiðar at seta 15 mia. dollarar í tað risastóra námsvinnufelagið Rio Tinto, sum milllum annað rekur tað stóra aluminiumsvirkið í Straumsvík í Íslandi. Tað fer at geva kinesarum ræðisrætt yvir 32 prosentum av partapeninginum í Rio Tinto. Sambært íslendskum fjølmiðlum hevur Rio Tinto havt fíggjarligar trupulleikar, síðani fyritøkan yvirtók eitt annað aluminiumsfelag í fjør. Altjóða fíggjarkreppan hevur ikki bøtt um støðuna, tí ein avleiðing av henni er, at prísurin á aluminium er fallin.

# Malan festir Koltursgarð

**31 ára gamla Malan Patursson úr Kirkjubø tekur við festinum á Koltursgarði eftir pápa sín, ið er farin í nýtt starv. Klokkan 14.30 mikudagin flytir hon saman við manninum og báðum børnunum til Kolturs at búgva**

ÚTOYGGJ
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*



*Í morgin klokkan 14.30 fara Malan, Petur, Sjúrður og Jóan Pauli til Kolturs – at búgva. Malan skal festa Koltursgarð eftir pápa sín, sum hevur rikið garðin seinastu 15 árini*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað var í desember mánað, at Malan Patursson og maður hennara, Petur á Dul Patursson, fingu tilboð um at taka yvir garðin hjá foreldrunum í Koltri. Síðan í 1994 hava Bjørn og Lükka Patursson búleikast í Koltri, har tey hava rikið Koltursgarð.

Malan og Petur hava saman við børnunum nýtt nógva tíð í Kolturi, og hava tískil eina hóming hvat tey koma til. Men tey ásanna somuleiðis, at eitt er at hjálpa til, og at tað er nakað heilt annað er at reka garðin sjálvur. Tey eru í løtuni í ferð við at pakka, og royna at fáa ymsu viðurskiftini upp á pláss áðrenn flytingina. Dreingirnir, ið eru átta og níggju ára gamlir, skulu hava skúlaundirvísing, og avtala er fyribils gjørd um at teir aðru hvørja viku skulu í skúla á Velbastað, og aðru hvørja viku fáa heimaundirvísing.

- Vit fara út fyri at royna tað. Vit hava verið nógv í Koltri, men nú verður tað nakað øðrvísi við tað, at Koltursgarður nú verður okkara arbeiði, í staðin fyri okkara frístað, sigur Malan Patursson.

Hon tók her fyri prógv sum heilsurøktari, og maðurin hevur higartil starvast sum el-innleggjari. Frammanundan hevur Malan Patursson útbúgving innan landbúnað, sum er eitt krav fyri at festa.

Jørðin í Koltri er øll landsjørð og Koltur er eitt festi við 17 mørkum í jørð. Við í festinum fylgja 160 áseyðir og umleið 30 skotsk fjallaneyt. Oksarnir verða aldir upp eftir altjóða vistfrøðiliga góðkendum reglum, og kjøtið verður selt til privat og vinnurekandi kring landið. Harafturat fær Koltur fíggjarligan stuðul frá landinum til at menna ferðavinnuna í Koltri.

- Vit ætla at reka garðin eftir sama spori sum foreldrini hjá mær.

Hendan festingin er heldur øðrvísi enn tá eitt náttúrligt ættarliðsskifti fer fram. Tá er vanligt at bæði ættarliðini arbeiða saman eitt skifti, áðrenn eldra ættarliðið flytir. Malan og Petur Patursson koma tó til manntóman garð, tí fyrrverandi bóndin er longu farin í annað starv.

Øll nútímans tøkni er í Koltri, og tyrlusamband er hvønn mikudag, fríggjadag og sunnudag.

Í mai mánaði fer lítla familjan at telja fimm limir, tí tá er Malan sett at eiga teirra triðja barn. Hesin nýføðingurin verður sostatt fyrsta barn, ið er føtt í oynni í fleiri enn 20 ár.

# Darwin 200 ár

**Í ár eru 200 ár liðin síðan Charles Darwin varð borin í heim. Árið verður hátíðarhildið kring allan heim, og saman við Fróðskaparsetur Føroya og Náttúrugripasavninum, fer Lívfrøðifelag Føroya at gera sítt til at minnast Darwin í 2009**

HÁTÍÐARHALD
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

12. februar eru 200 ár liðin síðan faðirin at menningarlæruni, Charles Darwin, varð borin í heim. Í tí sambandi fer Føroya Lívfrøðifelag, Fróðskaparsetur Føroya og Náttúrugripasavnið at skipa fyri ymiskum fyrilestrum gjøgnum árið.

Tann fyrsti av hesum verður á sjálvum føðingardegnum, tá fyrilestur verður um lívssøguna hjá Darwin, og um menningarlæruna sjálva. Aftur í juni mánaði verður fyrilestur, tá fer tað at snúgva seg um oyggjalívfrøði í samband við eina bókaútgávu um fyribrigdið. Jóhanna Olsen, næstforkvinna í Lívfrøðifelagnum, sigur at lívfrøðin vísir seg at mennast øðrvísi í oyggjasamfeløgum, og at hesum hevur høvundin at útgávuni granskað í.

Í august fer fyrilesturin at snúgva seg um týdningin av menningarlæruni hjá Darwin fyri heimsspeki og bókmentir. Í november mánaði eru 150 ár liðin síðan Origin of the Species kom út, og seinasti fyrilesturin í ár, verður í november, og fer at snúgva seg um phylogeni, hvussu vit hanga saman. Hvaðani stava vit, og hvussu tað verður greinað, bygt á teoriir hjá Darwin.

- Læran hjá Darwin – at tær livandi verurnar eru vornar til við náttúrligari útveljing gjøgnum milliónir av árum – hevur kollvelt okkara fatan av heiminum. Og hevur lært okkum at síggja okkum sjálvi sum ein part av náttúruni, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

*Kring heimin minnast tey 200 ára føðingardagin hjá Charles Darwin, faðirin at menningarlæruni*

